## Oyggjablaðið mikudagin: Viðareiði

**Komandi mikudag viðger Oyggjablaðið okkara norðastu bygd. Her hevur tú møguleika at hitta nøkur av spennandi fólkunum í bygdini. Lesið um:**



Malan elskar at ganga heima



Esmar arbeiðir fisk í Norðdepli



Elisabeth stríðist fyri tryggum vegasambandi



Tríggjar vinkonur sum dáma hestar



Rói: Vit mugu hugsa frameftir

# Samantvinna listina og gudstænastuna

**Tey seinnu árini hava ikki so mong fólk verið til tær serstøku kvøldgudstænasturnar í føstuni. Nú hava prestarnir í Suðurstreymoyar prestagjøldum tikið avgerð um at endurnýggja hesar gudstænastur nakað.**

Snorri Brend

Eitt eyðkenni fyri føstuna eru føstugudstænasturnar.

Her hava prestar úr einum prestagjaldi hava møguleika fyri at prædika í eini kirkju í einum øðrum prestagjaldi.

Í Suðurstreymi verða hesar gudstænasturnar hildnar mikukvøld í teimum trimum kirkjunum - Vesturkirkjuni, Havnar kirkju og í Hoyvíkar kirkju. Tvær gudstænastur verða í hvørjari kirkju, men hesaferð við eini rættiliga stórari broyting.

Vanliga hevur talan verið um eina vanliga gudstænastu, har teksturin hevur peikað fram ímóti páskum. Soleiðis verður eisini hesaferð, men tó við fleiri øðrvísi "innsløgum":

Líðingarsøgan ella passións-søgan fer at verða lisin, ein serligur føstusálmar verða sungnir, passiónstónleikur verður at hoyra og passiónslistin verður ummæld, og listafólk greiða frá síni egnu pasiónsslist.




*Í ár verða føstugudstænasturnar í Suðurstreymoy munandi øðrvísi enn undanfarin ár. Okkurt verður sum tað plagar, men nógv nýtt er á skránni, nú fyrsta føstugudstænastan verður mikukvøldið í Vesturkirkjuni*

Fyrsta gudstænastan verður mikukvøldið klokkan 20 í Vesturkirkjuni, har nýggi sóknarpresturin í Fuglafjarðar prestagjaldi, Anne Mette Greve Klemensen fer at prædika.

Í samband við hesa gudstænastuna fer Eyðun Eliasen, arkitektur at greiða frá. Eisini er ein løta við kvirru.

Eftir gudstænasta er kaffi at fáa.

# Hvalbingar skulu koyra spakuligari

Fyri at minka um ferðina inni í bygdum øki, fer Hvalbiar kommuna nú at seta ávís ferðslutiltøk í verk, bæði í Sandvík og Hvalba

Í Sandvík skal setast upp eitt stopp-skelti á niðara enda á Kirkjuvegi.

Her verður eisini eitt øki, har ein bert hevur loyvi til at koyra við avmarkaðari ferð - 30 km/t.

Í Hvalba verða tvey øki, har ein bert hevur loyvi at koyra við hesi ferðini.

Annað økið er inni í bygdini, meðan ein bert hevur loyvi at koyra 30 á Nesi.

Sagt verður, at henda broytingin kom í gildi 1. mars, ella so skjótt sum skeltini eru sett upp.

snorri@sosialurin.fo

# Vestmanna: Afturgongdin kom ikki óvart á

**- Í februar mánaði komu 5,3 % minni inn í skatti, verður sagt úr Vestmanna kommunu.**

Tølini fyri inntøkurnar hjá kommununum vísa, at Vestmanna fekk góðar 2,5 mió krónur inni í skatti, í mun til 2,7 í februar í fjør.

Í miðal høvdu aðrar kommunur 2,04 prosent afturgongd, men í Vestmanna var afturgongdin heldur størri - 5,33%.

- Vit høvdu væntað eina afturgongd, av tí at onki arbeiði hevur verið á fiskavirkinum, verður sagt úr Vestmanna kommunu.

Haraftrat lógu skipini eisini stóran part av mánaðinum.



*Lítið og einki fiskaarbeiði hevur verið í Vestmanna í ár, og tað sæst aftur í skattainntøkuni hjá kommununi*

Fleiri aðrar kommunur, sum eru tengdar at fiskivinnuni, høvdu afturgongd, - onkur teirra væl størri afturgongd: Runavík 6,88%, Fuglafjørður 11,07%, Kvívík 12,68%, Nes 13,70% og Hvalba 22,57%.

- Higartil í ár er skattainntøkan hjá okkum 4,42% lægri enn í fjør, staðfestir Vestmanna kommuna.

snorri@sosialurin.fo